**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11 verður morgunmøti v/Ólavur Jacobsen, og møti kl. 18 v/Ólavur Jacobsen.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangur, kl. 18 Møti. Vetrarstevna verður í døgunum 2.-4. februar. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Josvein Hovgård. Øll hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Fríggjadag kl. 19 Vitjanartænasta. Vit møtast í samkomuni áðrenn vit fara út!
Sunnudag kl. 11 Halgunarmøti. Loytn. R. Ludvig talar um »Stúrin frelst menniskju.«
Kl. 14 Sunnudagsskúli.
Kl. 17.30 Bønarløta. Kl. 18 Evangeliskt møti við Monu og John Nielsen.
Øll eru vælkomin í Frelsunarherin.
www.frelsunarherurin.fo

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 18 Møti. Terji Nielsen og Signheðin Olsen tala, Nimrod og Ebba syngja. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sumba**
Familjumøti verður sunnudagin 21/1 kl. 16. Luttøka av kvinnum frá YWAM- Brasil. Barnakórið syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow Suðuroy**
Møti verður í Vesturhøll í Fámjin leygardagin kl. 16. Luttøka av kvinnum frá YWAM-Brasil. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Losjan í Havn**
**Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Sjómansheimið Ørkin**
**Brautarholt 29, Reykjavík**
Hvønn sunnudag kl. 17 og fram til mai 2007 er møti á Ørkini.

**Veit okkum eina hjálpandi hond**
at seta ein grønmetis ídnað á stovn, millum tey fátæku í Rumenien.
**Ring 905699.** Kostnaðurin er kr. 100 + vanligt uppringingargjald. Kundar hjá Kall kunnu ringja. Takk fyri tína hjálpandi hond.
*Calarasi missiónin v/ Thomas J. Askham, Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.*

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
***Vikan 22.-26. januar***
***Mánadagin 22. januar***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11-11.45 Enskt
kl. 14-17 Kortspæl o.o spøl
***Týsdagin 23. januar***
kl. 10-11.30 Sangløta, Flemming og Benny Samuelsen
kl. 15 Týdningurin av rørslu - Marjun Poulsen, fysioterapeutur
***Mikudagin 24. januar***
kl. 10-13.30 Matgerð - Anne G. Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur - úr Tilhaldinum yvir Strond og heim eftir Hoyvíksvegnum
***Hósdagin 25. januar***
kl. 10-10.30 Fimleikur - Sonja Danielsen
kl. 11-12 ***Lesibólkur*** -
(Hvønn 1. hósdag í hvørjum mánaði. Byrja 1. februar.)
Bókin: Úr køksvindeyganum, Oddvør Johansen.
Samskipari: Bergljót Madsen
kl. 14-16 Boccia - Alma Poulsen
***Fríggjadagin 26. januar***
kl. 10-13.30 Matgerð - Anne G. Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 14-17 Opið hús
***Seinnapartar eru øll vælkomin at sita við egnum handarbeiði.***
*Teldur eru tøkar á aðru hædd. Dagljósskiggjar og súkklur á loftinum.*

**Landsfelag Pensjónista**
Felagið heldur til í Tróndargøtu 13, Tórshavn. Skrivstovan er opin hvønn týsdag frá kl. 13.00-16.00. Tlf. 319394 ella 219394.
LP@email.fo

**Tilhaldið á Toftum**
*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18,00
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv.*
*Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

**Eldrafelagið Kumlá á Skála**
hevur hugnakvøld týskvøldið 23.1. kl. 19. Jóhan Lervig hugleiðir.

**Dagtilhaldið Vesturskin**
***Opið er týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.***
***Týsdag*** - fimleikur
***Mikudag*** - Sangløta.
***Hósdag*** - ymist ítriv.
*Allar dagar er møguleiki at lesa bløðini og fáa sær ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Frá Dagtilhaldinum à Strondum**
Dagtilhaldið er opið hvønn týsdag og hósdag frá 15-18.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
er opið týsdag til hósdag, kl. 15-18.
***Týsdag*** ymisk spøl.
***Mikudag*** ítriv v/ Rigmor.
***Hósdag*** fimleikur v/ Áshild.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi**
*í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.*
*Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.*
*Opið mánadag til fríggjadag kl. 15.00 – 18.00.*
Skrá viku 4.
***Mánadagur 22. jan.***
Fimleikur
***Týsdagur 23. jan.***
Telduhugni v. Jens Dalsgaard.
***Mikudagur 24. jan.***
Enskt v. Annette Gaardlykke.
***Hósdagur 25. jan.***
Myndaveving v. Gretu Olsen.
***Fríggjadagur 26. jan.***
Boccia.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag kl 14 –17. Báðar dagarnar er drekkamunnur at fáa. Eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mánadagin 22. januar***
Arbeiða við ull.
***Mikudagin 24. januar***
Boccia.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag
kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag
kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
er opin týsdag og hósdag frá kl. 19.00-21.00.
Tlf. 318586.

**Opin ACA-fundur**
**Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.


# Starv í bókhaldinum



Gjaldstovan hevur um hendi Landsroknskapin, Búskaparskipan landsins og ein stóran part av almenna bókhaldinum.

Roknskaparhaldið á gjaldstovuni virkar sum eitt konsernroknskaparhald. Gjaldstovan tekur sær av t.d. inngjaldingum og útgjaldingum fyri stovnar.

Á gjaldstovuni arbeiða 32 fólk. Kjarnin í Búskaparskipan landsins er Oracle E-Business suite. Av øðrum skipanum kunnu verða nevndar:

- Felags lønarskipan
- Felags útgjaldingarskipan
- Búskettskipan
- Leiðslukunningarskipan
- Dátuvøruhús

Talið av brúkarum av loysnunum hjá Gjaldstovuni liggur okkurt um 1000.

Í løtuni verður arbeitt við at gera roknskaparhaldið á Gjaldstovuni 100% talgilt. Tað sum eyðkennir Gjaldstovuna eru broytingar, og at tað støðugt verður arbeitt við at menna verandi og nýggjar loysnir.

Talan er um góðar arbeiðsumstøður, bæði tá ið ræður um høli og útbúnað. Gjaldstovan arbeiðir við førleikamenning, hevur eina flekstíðarskipan, og í fíggjarmálaráðnum eru góð kantinuviðurskifti.

**www.gjaldstovan.fo**

**Arbeiðsuppgávurnar fevna í høvuðsheitum um:**
- avstemmingar t.d. millum ymsar skipanir
- vanligt bókhaldsarbeiði, sum kontering, bóking, ljóslesing, gera ymsar koyringar og arkivering
- arbeiði við landsroknskapinum
- samskifti við stovnar og borgarar

Lagt kann verða afturat, at starvsinnihaldið kann verða broytt í mun til tær royndir og útbúgving, sum tú hevur. Eisini skal tú avloysa við at fyrisita útgjaldingar landsins.

**Krøv:** Tað er fyrimunur, um tú hevur útbúgving á roknskaparøkinum - antin á hægri handilsskúla, ella hevur tikið roknskaparfakini á merkonomstigi e.t. Eisini er tað ein fyrimunur, um tú hevur royndir frá bókhaldi. Talan er um eitt stórt roknskaparhald, har fleiri skipanir virka saman fyri at skapa eina størri heild. Tí er tað týdningarmesta, at tú hevur yvirlit og hevur skjótt við at seta teg inn í ting. Tú skalt verða ein positivur persónur, sum hevur góð samstarvsevni, og sum ikki ert bangin fyri at taka ímóti nýggjum avbjóðingum og broytingum.

**Gjaldstovan kann bjóða:** Stovnurin kann bjóða eitt spennandi arbeiðsumhvørvi, har fakliga stigið er í støðugum framburði, og har tað verða brúkt framkomin EDV-amboð. Nevnt kann verða, at stórur partur av bókhaldinum á gjaldstovuni er talgilt.

**Setanarviðurskifti:** Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna, og starvið er lønt sbrt. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Treytað av útbúgving og royndum, so er starvið lønt í bólki III ella IV.

**Umsóknir:** Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða sendar til Føroya Gjaldstovu, Traðagøta 39, Boks 2009, 165 Argir. Umsóknarfreistin er 29. januar 2007. Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Maluna Rasmussen tel 35 24 75 ella tel 35 24 00.

DIMMALÆTTING 341200



# Verkfrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi til projekterings- og eftirlitsarbeiði við rørtekniskum innleggingum:

· HVS-innleggingar
· Ventilatiónsskipanir
· Kloakk skipanir
· Vatnveiting
· Fjarhitaskipan
· Sprinklaraskipan
· Maskintekniskar skipanir

Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving í verkfrøði ella líknandi og royndir við omanfyri nevndu arbeiðsøkjum.

Tað er umráðandi, at tú hevur góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult. Roknast kann við, at ein partur av arbeiðnum fer fram uttanlands.

Tað er ein treyt, at tú dugir at arbeiða við teldu og forritum sum Word, Excel, MSProject og AutoCad/ABS.

Løn og setanartreytir vera samsvarandi útbúgving og royndum og annars eftir avtalu millum partarnar.

Nærri upplýsingar um starvið, fáast við at venda sær til Árna Jakobsen tel 353521/233521.

Skrivlig umsókn við viðkomandi skjølum skulu vera okkum í hendi innan 1. februar 2007.

TEAM85

**Pf. Sofus M. Jakobsen**
**Ráðgevandi verkfrøðingar F.R.I.**

J.H. Schrøtersgøta 22, Postmoga 344, FO-110 Tórshavn
**Tel (+298) 353522 Fax (+298) 310622**